# KÍ snávaði, men reisti seg aftur

*Mikudagin og sunnudagin vóru dystir leiktir í kvinnudeildini, og hóast KÍ mikukvøldið legði rygg til sítt fyrsta tap í ár, bendir alt á, at tær gerast føroyameistarar, við tað at tær vunnu toppdystin í Havn móti HB*



*Skála tapti aftur um vikuskiftið, og eru tær einsamallar í botninum uttan mál ella stig*

Heini í Skorini

KÍ var í Runavík mikukvøldið og spældi útsetta dystin ímóti NSÍ. KÍ var favorittur undan dystinum, men uppgávan mikukvøldið vísti seg at gerast torførari enn væntað.

NSÍ legði seg á odda í fyrra hálvleiki við einum brotssparki, sum Irdi Hansen tók sær av, men síðani javnaði Rannvá Andreassen fyri KÍ. Beint fyri hálvleiksteðgin brendi KÍ brotsspark, og tíðliga í seinna hálvleiki brendi KÍ aftur frá 11 metra blettinum. Tær, sum brendu brotsspørkini hjá KÍ, vóru Rannvá Andreassen og Malena Josephsen. Í seinna hálvleiki gjørdust NSÍ kvinnurnar meiri og meiri ágrýtnar, og hóast Ingun Jacobsen varð rikin av vølli, megnaði Maibritt Olsen at leggja NSÍ á odda miðskeiðis í seinna hálvleiki. Í endanum av dystinum staðfesti Elinbjørg Hammer sigurin hjá NSÍ, og sostatt er hetta fyrsta tapið hjá KÍ í ár, og uttan iva besta úrslit hjá kvinnunum úr Runavík higartil.

**Tveir minuttir avgjørdu toppdystin**

Sunnudagin løgdu KÍ kvinnurnar leiðina til Havnar at spæla toppdyst móti HB, og eftir at tær taptu mikukvøldið í Runavík, var hetta ein gyltur møguleiki hjá HB at leggja seg einsamalt á odda.

At byrja við vóru liðini jøvn, men tað vísti seg, at tveir minuttir komu at vera sera avgerandi fyri dystin. Í 11. minutti fór ein stór misskiljing fram millum verjuna og málverjan hjá HB, og Elsa Maria Simonsen gjørdi sær dælt av hesum við at leggja KÍ á odda 1-0. Bert tveir minuttir seinni hálvbjargaði málverjin hjá HB eftir eitt KÍ skot, og enn einaferð var Elsa Maria Simonsen fyrst á bóltinum og økti um leiðsluna til 2-0. Sostatt var greitt, at nú fór at vera sera torført hjá HB kvinnunum at koma aftur, og hesir báðir minuttirnir vístu seg eisini at vera avgerandi í dystinum.

Sum dysturin leið kom HB meiri við, men tær komu ongantíð til teir veruligu málmøguleikarnar. HB hevði fleiri hornaspørk, men sum sagt kom einki burturúr. KÍ hevði eisini onkran málmøguleika gjøgnum dystin, men tá bert fýra minuttir vóru eftir av vanligu leiktíðini, legði KÍ lok á dystin við at økja til 3-0. KÍ fór í mótálop, og Mariann Joensen hevði síðsta fótin á bóltinum. Harvið tryggjaði hon KÍ sigurin, og KÍ kvinnurnar kundu fara norður aftur til Klaksvíkar við trimum sera týdningarmiklum stigum í viðførinum. Sostatt reisti KÍ seg aftur, eftir at tær snávaðu í Runavík mikukvøldið, og var hetta ein sera sannførandi endurreisn, sum vísti, at KÍ enn er liðið, ið hevur bestu møguleikar at gerast føroyameistarar.

KÍ var samanumtikið betra liðið, men tað setti síni spor, at HB hevði eina skerda verju. Eyðvør Thomsen, sum vanliga spælir í miðverjuni hjá HB, var ikki við, og hin leikarin í miðverjuni hjá HB, Silja á Borg, spældi við einum illa skaddum knæi.

**VB og B36 elta toppliðini**

B36 var sunnudagin á vitjan á Skála, har tær eftir nøkur skuffandi úrslit skuldu hava trý stig. B36 setti seg tíðliga á dystin, og í hálvleikinum var støðan 2-0 til havnarliðið, og tá var dysturin í roynd og veru avgjørdur. Elsebeth Jónsson legði B36 á odda miðskeiðis í fyrra hálvleiki, meðan Maria Vang skoraði til 2-0 beint fyri hálvleik. Beint áðrenn dysturin endaði, staðfesti Selma Dahl sigurin fyri B36, og sostatt elta B36 kvinnurnar enn oddaliðini KÍ og HB, hóast tað fer at vera torført hjá teimum at gera seg galdandi í FM stríðnum, eftir at tær hava tapt á bæði HB og KÍ.

VB var sunnudagin í Runavík og vitjaði, har tær skuldu hava endurreisn eftir tapið móti HB seinasta vikuskiftið. Uppgávan í Runavík var ikki hvør sum helst, tí NSÍ vann jú sum sagt 3-1 á KÍ mikukvøldið. VB hevði yvirvág í dystinum, og miðskeiðis í fyrra hálvleiki kom VB á odda, og var hetta eitt sjálvmál. Diana Dahl legði stutta løtu seinni VB á odda 2-0, og hetta var eisini hálvleiksstøðan í Runavík. Tíðliga í seinna hálvleiki minkaði Maibritt Olsen fyri NSÍ, men Rini Mørk økti fyri VB til 3-1 miðskeiðis í seinna hálvleiki. Umleið 10 minuttir seinni minkaði NSÍ aftur til 3-2, hesaferð skoraði Irdi Hansen málið hjá NSÍ, men beint fyri dystarlok staðfesti Halltóra Joensen sigurin hjá VB við at skora til 4-2.

VB eltir eins og B36 oddaliðini HB og KÍ, og næsta vikuskiftið verður eitt sera avgerandi vikuskiftið. Tá tekur VB ímóti B36, og hvørki av liðunum kann nýta ein javnleik til nakað, tí so verður ov langt upp til toppliðini KÍ og HB. KÍ tekur ímóti NSÍ sunnudagin í Klaksvík, og spennandi verður at síggja, um NSÍ kann endurtakað bragdið frá mikukvøldinum, tá tær bastu klaksvíkskvinnum 3-1. HB hevur eina lættari uppgávu í Havn móti Skála, og um KÍ enn einaferð skuldi snávað móti NSÍ, kunnu trý stig fyri HB gerast sera kærkomin og avgerandi.

Í løtuni hava KÍ og HB 12 stig fyri ávikavist fimm og seks dystir. VB og B36 hava 10 stig fyri ávikavist fimm og seks dystir, meðan NSÍ og Skála hava ávikavist trý og einki stig fyri fimm dystir.

Dystirnir undanfarnu vikuna vóru hesir:

**NSÍ-KÍ 3-1**
(mikudagin)
NSÍ: Maibritt Olsen 1, Irdi Hansen 1, Elinbjørg Hammer 1.
KÍ: Rannvá Andreassen 1.

**HB-KÍ 0-3**
KÍ: Elsa Maria Simonsen 2, Mariann Joensen 1.

**Skála-B36 0-3**
B36: Elsebeth Jónsson 1, Maria Vang 1, Selma Dahl 1.

**NSÍ-VB 2-4**
NSÍ: Irdi Hansen 1, Maibritt Olsen 1.
VB: Diana Dahl 1, Rini Mørk 1, Halltóra Joensen 1, sjálvmál 1.

**Máltindurin**

| | | |
|---|---|---|
| Malena Josephsen | KÍ | 11 |
| Guðrun í Lágabø | VB | 7 |
| Eyðvør úr Dímun | HB | 6 |
| Annika Godtfred | HB | 5 |
| Rannvá Andreasen | KÍ | 5 |
| Vivian Bjartalíð | KÍ | 5 |
| Irdi Hansen | NSÍ | 5 |
| Maibritt Olsen | NSÍ | 4 |
| Elsebeth Jónsson | B36 | 3 |
| Maria Vang | B36 | 3 |
| Sólvá Joensen | B36 | 3 |
| Elsa Maria Simonsen | KÍ | 3 |
| Margit Joensen | KÍ | 3 |
| Ragna Andreasen | KÍ | 3 |
| Halltóra Joensen | VB | 3 |
| Laila Jespersen | VB | 3 |
| Laila Enghamar | B36 | 2 |
| Annika Poulsen | VB | 2 |
| Diana Dahl | VB | 2 |
| Selma Dahl | B36 | 1 |
| Sólgerð Viderø | B36 | 1 |
| Eyðfríð Christiansen | HB | 1 |
| Marian Joensen | KÍ | 1 |
| Elinbjørt Hammer | NSÍ | 1 |
| Elsebeth Olsen | NSÍ | 1 |
| Rannvá Augustinussen | VB | 1 |
| Rini Mørk | VB | 1 |
| Sjálvmál | | 2 |

adidas

**Støðan, 1. deild kvinnur**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 5 | 4 - 0 - 1 | 31 | 3 | 28 | 12 |
| 2 | HB | 6 | 4 - 0 - 2 | 12 | 14 | -2 | 12 |
| 3 | VB | 5 | 3 - 1 - 1 | 21 | 9 | 12 | 10 |
| 4 | B36 | 6 | 3 - 1 - 2 | 13 | 8 | 5 | 10 |
| 5 | NSÍ | 5 | 1 - 0 - 4 | 11 | 15 | -4 | 3 |
| 6 | Skála | 5 | 0 - 0 - 5 | 0 | 39 | -39 | 0 |



# Hondbóltslandsliðini farin í gongd

*Sum liður í fyrireikingunum til komandi avbjóðingarnar, hava A-landsliðini hjá monnum og kvinnum verið á venjingarlegu í Danmark*

Jákup Mørk

Ein partur av venjingarleguni var eisini at luttaka í sonevndu Hummel Cup kappingini í Aalborg, men undan hesum leiktu liðini eisini tveir venjingardystir í part.

Kvinnurnar leiktu móti ávíkavist Års og Hobro IK, og vunnu tær báðar sínar dystir.

Menninir vunnu somuleiðis sín dyst móti Års, men máttu lúta fyri Stafa, sum heldur til í bestu svensku deildini.

**Taptu allar**

Mennirnir leiktu móti FF, Ikast Bording, Odense HF og Hercules HK, og teir taptu allar dystirnar. Móti FIF, sum spælur í bestu donsku deildini, taptu føroyingarnir við 20 málum. móti Ikast-Bording sum eisini spælur í bestu donsku deildini taptu okkara við 5 málum.

Móti Odense HF, sum spælir í næstbestu donsku deildini varð tapið eiitans mál, og í seinasta dystinum, móti norska HK, var munurin so lítil, sum hann kundi verða. Í seinastu sekundunum eydnaðist nevnliga norðmonnunum at skora til 20-19.

**Gekk betri hjá kvinnunum**

Kvinnurnar leiktu í sín part fýra dystir, og av hesum eydnaðist tað at vinna teir tríggjar. Móti Tvis KFUM kom einasta tapi, sum var við einum málið. hinir dystirnir vórðu allir vunnir. Móti Åbybro 20-11, móti Skjern GF 20-18 og móti Haderslev somuleiðis 20-10.

Hetta var nóg mikið hjá kvinnunum til at tryggja sær sigurin í teirra bólki. Frá HSF frættist, at venjararnir báðir, Palli Joensen og Sophus Dahl-Christiansen vóru væl nøgdir við venjingarleguna.

*Føroyska manslandsliðið tapti allar sínar dystir í Hummel Cup kappingini í Aalborg. Kvinnurnar vunnu tríggjar av sínum dystum, og fingu fyrsta plássið í sínum bólki*



# Kanónirnar koma fríggjadagin

*Slovenararnir, sum hava nógvar útisetar úr vestureuropeiskum feløgum í ferðalagnum, skulu bæði venja á Tórsvølli og á Svangaskarði*

Fríggjamorgunin kemur slovenska landsliðsferðalagið í Vágar við leiguflogfarið. Seinnapartin ætla teir at venja á Tórsvølli, og leygardagin klokkan 17 fara teir á Svangaskarð.

Slovenski venjarin eitur Srecko Katanec. Hann hevur nógvar spælarar, sum vinna til dagsins uppihald og reiðiliga tað í útlandinum, og júst sum føroyski venjarin og flestu landsliðsvenjarar í Europa setir hann sítt álit á, at útisetarnir skulu syrgja fyri, at teir fáa øll stigini heim aftur við úr Føroyum.

Feløgini, sum útisetarnir umboða, siga okkum, at talan á ongan hátt verður um lætta uppgávu hjá føroyska liðnum.

Málverjarnir hjá Slovenia eru Mladen Dabanovic, Lokeren og Marko Simeunovic, Maribor Pivovarna Lasko.

Útispælararnir eru Spasojé Bulaic, FC Köln, Marinko Galic, Maribor Pivovarna Lasko, Zeljko Milinovic, GAK Graz, Muamer Vugdalic, Maribor Pivovarna Lasko, Ales Ceh, GAK Graz, Sasa Gajser, Gent, Amir Karic, Maribor Pivovarna Lasko, Miran Pavlin, Porto, Zoran Pavlovic, Dinamo Zagreb, Đoni Lovak, Sedan Ardennis, Rajko Tavcar, 1. FC Nürnberg, Zlatko Zahovic, Valencia, Milan Osterc, Hapoel Telaviv, Mladen Rudonja, Portsmouth, Ermin Siljak, Servette og Saso Udovic, Lask Linz.

JH

# Tíðindaskriv, Ægir

Nú skúlaárið aftur er byrjað, hevur nevndin í svimjifelagnum Ægir havt fund og tilrættislagt komandi svimjiárið. Útlitini vóru ikki so góð, tá svimjiðarið endaði við tað at Martin Venned legði frá sær sum høvuðsvenjari. Vit takka Martini fyri tað farna.

Síðani varð søkt eftir nýggjum venjarum, og hava vit verið so heppin, at fingið fleiri av okkara goðu gomlu svimjarum aftur sum venjarar. Sum høvuðsvenjara hava vit sett Sørin Olsen og sum hjálparvenjarar Róa á Kósini, Rannvá Dahl, Alexandur á Dul og Fíu Høj. Rói og Rannvá verða eisini við á fyrsta liði og koma at venja saman við Mouits Danberg úr HS, Ulrik av Hjøllum, Flot, og Sandy í Lambanum, Flot, sum taka víðari útbúgving í Klaksvík.

Katrin Michaelsen kemur at taka sær av teimum yngstu svimjarunum.

Venjingartíðirnar verða at byrja við: Kappsvimjarar møta kl. 19.00 30. august og hini møta kl. 18.00 30. august. Tey minstu møta kl. 18.00 13. september. nevndin hevur skipað seg soleiðis: John Mikkelsen, formaður, Tina Purkhús, svimjileiðari, Julianna í Heimistovu, kassameistari, Birgit Hansen, skrivari, Heidi Biskopstø, tiltakslimir og Amanda Gullaksen, nevndarlimur. Esiini hevur nevndin arbeitt við at betra umstøðurnar hjá venjarunum. Vit hava gjørt sáttmálar við venjararnar, fingið berbara teldu og nýggjar draktir, shorts og T-shirts eru á veg. Til alt hetta krevst góður stuðul og nógv arbeiði. Nevndin hevur havt úr at gera, og vóna vit at svimjiárið verður læruríkt. Í hesum sambandi vilja vit takka øllum, sum hava stuðlað við eningagávum og øðrum og ikki minst øllum teimum foreldrum, ið mansterk hava staðið saman um felagið.

Við svimjikvøðu

nevndin


